# Føroyingur starvast á heimsins størsta marglætisskipi



Olivur Andreasen

**Niðri í maskinrúminum á "M/S Freedom Of The Seas" gongur ein føroyingur og hjúklar um maskinurnar. Oliver Andreasen er fyrsti maskinmeistari á heimsins størsta marglætisskipi.**
**"M/S Freedom Of The Seas" er eitt óvanliga stórt marglætisskip. Skipið er 339 metrar langt, 58 metrar breitt og 15 dekk høgt.**
**Og so vigar tað smá 160.000 tons**

*Rókur Jákupsson Jakobsen*
*rokur@sosialurin.fo*

Í løtuni er M/S Freedom of the Seas ávegis móti Oslo. Skipið varð latið reiðarínum í gjár í Hamborg, so nú fer skipið á eina lýsingaherferð í Oslo, Southhampton og síðani verður farið tvørtur um Atlantshavið til New York.

Oliver Andreasen fortelur fyri Sosialinum at tað eru fýra ár síðan at hann varð knýttur at reiðarínum Royal Caribian. "Eg sigldi undir einum donskum reiðarìi, men so gjørdust tíðirnar ringar. Onkuntíð undraði tað meg, hvussu tey stóru reiðaríini fingu hesi stóru marglætisskipini at bera seg, og so valdi eg bara at senda eina umsókn, eftir sum at tíðirnar gjørdust so ringar her á leiðum. Áðrenn eg visti av, var eg uppringdur úr USA. Teir vildu hava meg út at sigla beinanvegin, og eg gjørdist ikki sørt kløkkur, tí eg visti ikki ordiliga um eg meinti tað í álvara", sigur ein flennandi Oliver Andreasen.

## Um skipið

Skipið er á norskum og amerikanskum hondum. Freedom of the seas er skip nr. 30 hjá reiðarínum Royal Caribian. Hetta er heimsins størsta cruiseskip. Fyri fáum døgum síðan var tað Queen Elisabeth 2, sum hevði metið, men nú tá ið Freedom of the seas er liðugt, hava tey sett eitt nýtt met. Skipið fer at sigla úr Miami. Haðani siglir Freedom of the seas á vikuferðir til Jamaika, Meksiko og Grand Cayman. Í skrivandi løtu verða tvey systirskip eisini bygd.

Umborð eru allir hentleikar sum ferðafólk kunnu ynskja sær í dag. Har eru 10 matstovur, og maturin er íroknaður prísinum, so har er ongin orsøk at ganga við tómum maga. Ert tú tystur, so eru eisini ráð fyri tí. Heili 16 barrir eru umborð, og á hesum barrum kanst tú dansa til 5 ymiskar tónleikabólkar.

Eisini er rúmur møguleiki fyri at shoppa. Ein gongugøta er umborð, og hon er 100 metrar til longdar. Gongugøtan er fýra dekk høg, og hon er eitt kopi av eini gongugøtu í Italia.

## Marglæti

Tú noyðist ongantíð at keða teg umborð á Freedom of the seas. Har er eitt risa baðiland sum er hóskandi til alla familjuna. Svimjihyljar, gosbað og rutsjebanar eru at finna har. Eisini er nakað heilt nýtt ið rópast Flow Rider. Hetta er skipan sum ger, at tú kanst surfa innandura.

Um tú ikki líður av hæddarræðslu ert tú eisini vælkomin at royna tíni kynstur á einum 12 metrar høgum klatriveggi.

"Har er eisini eitt stórt kasino umborð á Freedom of the seas. Har eru eini 300 maskinur at spæla á, og eisini eru 20 spæliborð", sigur Oliver Andreasen.

## Føroyingurin í maskinuni

"Vit eru einir 50 ið arbeiða í maskinuni. Her eru seks høvuðsmotorar, og vit hava umleið 100.000 hestakreftir", sigur fyrsti maskinmeistarin Oliver Andreasen. "Umborð arbeiða 1400 fólk, og vit umboða nógvar ymiskar tjóðskapar. Vit kunnu hava 4300 ferðafólk við umborð, so tá ið skipið er fullsett, er tað sum Norðoyggjar fara ein túr til sjós", sigur Oliver Andreasen skemtandi.

"Hetta eru øgiligar stórar kreftir, sum vit hava við at gera. Tá ið skipið siglir við fullari ferð, brennir tað 340 tons av tungolju um samdøgrið. Hetta sigur eitt sindur um hvussu stórt skipið er", sigur Oliver Andreasen. "Eisini hava vit tørv á nógvum feskvatni. Vit umgera 2500 tons av sjógvi til feskvatn um samdøgrið".

"Hetta er eitt marglætisskip. Prísirnir liggja frá kr. 4.000 til kr. 10.000, fyri eina viku á tí Karibiska havinum. Tey sum ferðast við skipinum eru tey flestu frá 45 og niðureftir", greiður Oliver Andreasen frá.

Spurdur um starvsfólkið hevur loyvi til at njóta hentleikarnir umborð á skipinum, sigur Oliver soleiðis. "Vit offiserar kunnu ferðast sum vit hava hug, men tað krevur at vit eru í búna", sigur Oliver Andreasen at enda.

**FAKTA**
Oliver Andreasen
42 ár
Argir
1. maskinmeistari á Freedom of the seas



*M/S Freedom of the seas*


# Bilverkstaður til sølu



Bilverkstaðið hjá P/F Mogens Petersen á Tvøroyri er til sølu.

Bygningurin er partvís í tveimum hæddum. Í stovuhæddini er verkstaður, sum er umleið 400m2 og handil, sum er umleið 160 m2.

Í ovaru hæddini eru sethús, sum eru 144 m2.

Bilverkstatðið kann gera umvælingar av øllum bilum, stórum og smáum, og hevur eisini sproytirúm.

Bygningurin er frá 1978, og er í góðum standi. Handilin er nýliga umvældur. Grundøkið er 1432m2.

Partafelagið hevur avtalu við P/F Føroya Shell um oljusølu.

Áhugaðir keyparar kunnu venda sær til:

**Suðuroyar Bókhaldsvirki sp/f**
**Fo 950 Porkeri**
**Tlf. 373667**